Meira peningur til bryggjur, bátahylar og havnaløg

Úr røðu J. Fr. Øregaards tá løgmansrøðan var til viðgerðar:

Føroyska vinnulívið tykist nú at fara at hava eina uppgongu tíð. Eg veit væl, at tað, at siga nakað um framtíðina er sum at seta kós út í nakað ókent. Men tað er tó mangt sum týð ur uppá, at ætlan mín er røtt:

1) Vørurnar, vit framleiða, eru tað menn aðrar staðir kalla mangulvørur. Hetta hevur til fylgju, at prísirnir verða høgir.

2) Framleiðsluamboð føroyinga eru bæði meira fjølbroytt, nógv fleiri enn nakrantíð áður, og í nógv betri standi enn fyrr, so vit kunnu fram leiða mangar ferðir meira enn áður.

3) Vit hava fingið lagt so tilrættis, at atgongdin til kapital hjá honum, sum hevur eina ætlan, er so nógv lættari enn nakrantíð fyrr, so tann framtakshugur, sum merkist allastaðni, ikki nýtist at standa við tómum hondum. Hesin vilji, sum nokk eisini áður hevur verið til staðar, finnur nú útloysn í ágrýtni og tiltøkum.

Hetta er myndin av framtíðini. Bæði tað almenna og teir privatu hava nú nógv lættari atgongd til pengar, enn nakran tíð fyrr. Tað er tí skilligt, at tann skapanarhugur, sum í føroyingum býr vil koma meira týðuligt fram og á mongum økjum heilt revulutionera okkara samfelag.

At vit ikki eiga at fara fram eftir fummum skuldi ikki verið neyðugt at lagt afturat. Men tá eg geri tað, so er tað tí, at vit á summum økjum hava holla vitan, meðan vit á øðrum økjum eru heilt nýbeginnarar, standa nærum á berum. Nú er tað so, at tey mest framkomnu londini selja nakað, tey kalla vitan. Tekniskan assistansa, hesum megu vit eisini gera brúk av, um ikki mong tiltøk skulu misseydnast. Tað er óvuliga umráðandi, navnliga um føroying ar koma at gera brúk av teim nógv øktu íðnaðarmøguleikunum, sum við lógini um føroyskan íðnaðargrunn verða skaptir ikki skulu mistaka seg, at vit gera langt meira brúk av fremmandari tekniskari kon sultasjónsvirksemi. Men hetta kann møguliga koma at falla tí einstaka virkinum ov stór útreiðsla.

Tað eigur tí at verða umhugsað, um ikki ta almenna skal hjálpa til her, og um ikki teir pengar, sum frá almennari síðu verða útlatnir til nettupp hesa fyrireiking , ikki vilja spara landskassan fyri munandi seinri veitingar.

Í hesum valskeiði eydnaðist tað okkum at loysa mangar týðandi spurningar, og at skapa forútsetningar fyri eini betri framtíð fyri land og fólk — og allar teir, sum hava vilja og áræði til at fara undir nakað nýtt, loysa úr lagdi, ella modernisera og halda fram á sama støði.

Men vit loystu ikki allar spurningar. Lívið heldur fram og hvør dagur opnar fyri nýgg jum møguleikum — og stillar nýggj krøv bæði til pengar og uppfindsomheit, bæði til privat og alment fyritaksemi.

Løgmaður nevnir í røðu síni mál, sum eru greidd og onnur mál, sum tørva loysn og enn ikki eru greidd. Í teimum skjølum sum viðløgd eru útarbeidd av hinum landsstýrismonnunum og umhandla málsøkir, teir hava við at gera.

Eitt av teimum er umleggingin innan fiskivinnuna. Í hes um sambandi verður millum annað hugsað um tey skip, sum bygd vóru til línufiskiskap, men sum vegna minni fong í Grønlandi og við New Foundland ikki longur kunnu reka hesa vinnu lønsamt. Men ein umlegging her kostar peng ar, sum eigararnir ongan møgu leika hava at skaffa sjálvir. Skulu hesi skip bjargast uttan at skifta eigara, og teir menn sum hava ofrað pening, ágrýtni og tíð, missa alt, má tað almenna hjálpa til. Fleiri av hesum skipum eru soleiðis útgjørd, at tað er ikki kostnaðarmikið at leggja um.

At størri partur av skipum og bátum nú taka lut í heima fiskiskapinum stillar nógv størri krøv til fassilitetir ella hentleikar á landi. Her má nógv meira peningur veitast til atløgubryggjur, bátahylar og havnaløg.

Tann nógv økti sildaveiðuflotin setur sjálvandi nógv størri krøv til virkir á landi, um vit ikki skulu standa í tí støðu, at skipini vera at liggja við bryggju og ikki sleppa av við fong sín. Her er støðan heilt óyvirskuulig um vit verða ov seinir á sjóvarfallinum, tí meðan saltfiskur kann verða lagdur í hús í fleiri mánaðar, feskur toskur leggjast í ís í fleiri dagar, so gerst hetta hvørki við sild ella við tann sokallaða »skidtfisk«. Tey skip sum veiða á henda hátt og henda fisk, megu sleppa av við veiðuna, tá tey leggja at landi. Eisini vildu nógv fleiri skip veitt sild til matna og landa í Føroyum, um tíðarhóskandi virkir vóru á landi at tikið ímóti og arbeitt sildina.

Her er tað gleðiliga hent, at teir sum hava arbeitt á hesum øki, og teir sum hava selt sildina, nú hava tikið sær um reiggj og farnir at skipa fyri útbyggjan eisini á hesum øki.

Vetrarferðaætlan

galdandi frá fríggjadegi 23. oktober 1970

SMYRIL

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Friggjadag	Leygardag	Sunnudag
kl. 10 Tórshavn Tvøroyri Vág	kl. 7 Vág Tvøroyri kl. 8.30 Tvøroyri Tórshavn kl 14 Tórshavn Tvøroyri	kl. 8 Tvøroyri Tórshavn kl. 14 Tórshavn Tvøroyri	kl. 8 Tvøroyri Tórshavn kl. 14 Tórshavn Tvøroyri Vág	kl. 7 Vág Tvøroyri kl. 8.30 Tvøroyri Tórshavn kl. 18 Tórshavn Tvøroyri	kl. 8 Tvøroyri Tórshavn kl. 14 Tórshavn Tvøroyri	kl. 18 Tórshavn Tvøroyri
ferm. kl. 8—10	ferm. kl. 11.30—13.30	ferm. kl. 11.30—13.30	ferm. kl. 11.30—13.30	ferm. kl. 11.30—13.30		

DAGSTJØRNAN

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Friggjadag	Leygardag
kl. 9 Tórshavn Miðvág kl. 13 Miðvág Tórshavn ferm. kl. 7-9 og 15-17	kl. 7 Tórshavn Sand Sandvík Hvalba Tórshavn	kl. 9 Tórshavn Miðvág kl. 13 Miðvág Tórshavn ferm. kl. 7-9 og 15-17	kl. 7 Tórshavn Sand Sandvík Hvalba Tórshavn	kl. 9 Tórshavn Miðvág kl. 13 Miðvág Tórshavn ferm. kl. 7-9 og 15-17	kl. 7 Tórshavn Hvalba Sandvík Sand Tórshavn


PRIDE

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Friggjadag	Leygardag
kl. 7 Klaksvík Tórshavn kl. 14 Tórshavn Klaksvík	kl. 6.30 Klaksvík Fuglafjørð Klaksvík kl. 9 Klaksvík Tórshavn kl. 14 Tórshavn Klaksvík	kl. 8 Klaksvík Tórshavn kl. 12 Tórshavn Kaldbak Tórshavn kl. 14 Tórshavn Klaksvík	kl. 6.30 Klaksvík Fuglafjørð Klaksvík kl. 9 Klaksvík Tórshavn kl. 14 Tórshavn Klaksvík	kl. 8 Klaksvík Tórshavn kl. 12 Tórshavn Kaldbak Tórshavn kl. 14 Tórshavn Klaksvík	kl. 7.30 Klaksvík Gøta Klaksvík kl. 11 Klaksvík Tórshavn kl. 14 Tórshavn Klaksvík
ferm. kl. 9—13.30	ferm. kl. 11—13.30	ferm. kl. kl. 10—12	ferm. kl. 11—13.30	ferm. kl. kl. 10—12	

MÁSIN

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Friggjadag	Leygardag
kl. 7 Tórshavn Nólsoy Tórshavn kl. 8 Tórshavn Skopun Tórshavn kl. 13.30 Tórshavn Nólsoy Tórshavn kl. 15* Tórshavn Skopun Tórshavn *) des. jan. verður siglt kl. 12.30 og kl. 14	kl. 8 Tórshavn Hest Skopun Tórshavn kl. 14 Tórshavn Skopun Tórshavn	kl. 8 Tórshavn Skopun Tórshavn kl. 12 Tórshavn Nólsoy Tórshavn kl. 14 Tórshavn Skopun Tórshavn	kl. 8 Tórshavn Hest Skopun Tórshavn kl. 14 Tórshavn Skopun Tórshavn	kl. 8 Tórshavn Skopun Tórshavn kl. 12 Tórshavn Nólsoy Tórshavn kl. 14 Tórshavn Skopun Tórshavn	kl. 8 Tórshavn Skopun Hest Tórshavn kl. 13.30*) Tórshavn Nólsoy Tórshavn kl. 15*) Tórshavn Skopun Tórshavn *) des. jan. verður siglt kl. 12.30 og kl. 14

CONION ferðaradio



Millumbylgja við Tórshavn-Radio. — FM bylgju umráði. Útvarpið byrjar at senda FM í summar.

Við tasku og oyraproppi. — Prísur: *228,00 kr.*

RADIOBÚÐIN, Runavík, tlf. 7008

RADIO-EL Tórshavn, tlf. 1397